UTTAN ÚR HEIMI

## Russar gjørdu "Katrinu"

Amerikanski veðurfrøðingurin Scott Stevens er sannførdur um, at ódnin "Katrina" var eitt væl skipað yvirgangsálop á USA.

Stevens hevur í fleiri ár hildið uppá, at tað er ikki náttúran, sum stýrir veðrinum á Jørðini, og hann sigur seg vera sannførdan um, at "Katrina" varð gjørd við hjálp frá veðurmaskinum, sum sovjetska fregnartænastan KGB gjørdi í seksti- og sjeytiárunum. Hann sigur, at fylgisveinamyndir av "Katrinu" vísa, at tað vóru serliga sterkir generatorar við elektromagnetiskum økjum og sera høgum ljóðbylgjum, sum ta hørðu skaptu ódnina.

Men russar vóru ikki einsamallir, tí sambært Scott Stevens var tann japanska mafian, Yakuza, uppií. Hann sigur, at japanska mafian leigaði fleiri veðurmaskinur frá KGB í 1989, og at Yakuza hevur stýrt veðrinum í Norðuramerika síðani. Sambært Stevens leigaðu japanar veðurmaskinurnar fyri at hevna amerikanska kjarnorkuálopið á Hiroshima og Nagasaki í 1945.

Scott Stevens ávarar amerikanararnar um, at USA verður rakt av einari náttúruvanlukku afturat í ár. Hesaferð verður tað ein harður jarðskjálvti ella eitt gos, sum verður har vesturi í landinum, sigur hann.

## Røkke skal umvæla

Norska stórfyritøkan Aker Kværner hjá kenda vinnulívsmanninum Kjell Inge Røkke væntar at sleppa at umvæla ein part av oljuútbúnaðinum, sum fekk skaða í ódnarveðrinum í amerikonsku suðurstatunum.

Fyritøkan hevur ikki fingið nakrar fyrispurningar enn, men talsmaðurin hjá Aker Kværner, Torbjørn Andersen, sigur við blaðið VG, at fyritøkan er til dystin fús, og at hon hevur tann neyðuga førleikan. Fyribilskanningar hava víst, at partar av oljuútbúnaðinum í suðurstatunum fingu stóran skaða av "Katrinu". Aker Kværner hevur eisini eitt ávíst virksemi har, men útbúnaðurin hjá norsku fyritøkuni slapp rættiliga væl burtur úr ódnarveðrinum, skrivar VG.

Amerikanska deildin hjá Aker Kværner tekur lut í hjálpararbeiðinum aftan á ódnina. Eitt nú hava starvsfólkini savnað pening til tey neyðstøddu.

## Hitler-gøta í Onglandi

Eitt gøtunavn hevur elvt til mikið stríð í tí lítla fiskivinnubýnum Megavissey í Cornwall har suðuri í Onglandi.

Gøtan eitur "Cliff Park", men á manna munni verður hon dagliga kallað "Hitler-gøtan". Hon hevur navn eftir einum tænastumanni, sum fólk í Megavisey plagdu at samanbera við týska nazistaleiðaran Adolf Hitler. Tað skal tó sigast, at gøtan fekk navnið longu í tríatiárunum, og tá kundu fólk í Megavissey ikki vita, hvat Hitler seinni fór at finna uppá.

Fyri fjúrtan døgum síðani samtykti kommunan, at gøtan skal ikki eita "Cliff Park" longur, men "Hitlergøtan", og tað hevur fingið øði í fleiri. Tí er kommunustýrið kallað saman at viðgera málið. Tey, sum eru ímóti navninum, siga, at tey fara at skræða navnaskeltið niður, samtykkir kommunustýrið at varðveita Hitler-navnið.

## Eisini brek við Ford

Bilverksmiðjan Ford hevur gjørt av at umvæla ikki færri enn 3,8 milliónir bilar, tí teir hava brek.

Tað hevur víst seg, at bilarnir hava eitt brek, sum ger, at eldur kann koma í motorin, sjálvt um motorurin er sløktur. Sambært CNN hevur Ford fingið kærur frá umleið 660 bileigarum, sum hava kært seg um, at eldur brádliga kom í bilarnar, og at teir stóðu í ljósum loga eftir lítlari løtu.

Brekið hevur fingið nógva umrøðu í USA, eftir at CNN avdúkaði tað, og amerikonsaku ferðslumyndugleikarnir kravdu alt fyri eitt, at Ford skuldi umvæla bilarnar fyri egna rokning. Sum skilst eru tað yvirhøvur vøruvognar og smáir lastbilar, sum hava brekið, ið kann festa eld í teir.

# Standa allan dagin í bíðirøð eftir neyðhjálp

*Tey neyðstøddu eftir ódnina "Katrina" standa allan dagin íbíðirøð fyri at fáa fatur á tí mest neyðuga*




**USA fær neyðhjálp úr øllum ættum, men tey neyðstøddu noyðast at bíða leingi eftir hjálpini**

NEYÐHJÁLP
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanararnir eru ímillum tey dugnaligastu, tá tað ræður um at hjálpa øðrum, men teir seinastu dagarnir hava avdúkað, at teir duga ikki at umsita neyðhjálp frá øðrum og at fáa hana fram. Matvørur, tjøld, sengur og annað hópa seg upp í stórum goymslubygningum, meðan tey neyðstøddu standa í bíðirøð og bíða eftir at fáa hendur á tí, teimum tørvar.

Tíðindastovurnar skriva, at túsundtals fólk standa í bíðirøð allan dagin. Tey flestu bíða eftir matseðlum, onnur eftir onkrum at búgva í, uppaftur onnur bíða eftir pengum, og onnur lata seg skráseta, so børnini kunnu sleppa í skúla onkunstaðni. Hjá nógvum er tað sálarliga trýstið stórt.

- Vit brúka at kalla allan dagin til at standa í bíðirøð fyri at fáa fatur á tí mest neyðuga. Fært tú einki, ræður um at sova einar tríggjar ella fýra tímar og so aftur í bíðirøðina at standa, sigur David Williams við Reuters. Saman við fleiri túsund øðrum býr hann í teirri stóru ítróttarhøllini Astrodome í Houston.

Fyrradagin elvdi tann drúgva bíðitíðin til misnøgd, so løgreglan noyddist at leggja uppí at forða fyri ófriði.

Meginparturin av neyðhjálpini kemur úr teimum ríku londunum, men fleiri av teimum fátæku londunum munnu kenna tað sum eina moralska skyldu at samsýna USA. Í hvussu er hava lond sum Afghanistan, Bangladesh og Sri Lanka sent teimum neyðstøddu í USA hjálp, skrivar Reuters.

# Colin Powell skammast

**-Røðan í ST-trygdarráðnum um hópoyðingarvápnini hjá Irak er og verður ein dimmur blettur í fortíð míni, sigur fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrrverandi amerikanski uttanríkisráðharrin Colin Powell sigur, at hann skammast av røðuni, sum hann helt í ST-trygdarráðnum, tá hann legði Irak undir at hava hópoyðingarvápn.

-Røðan er ein dimmur blettur. Tað var eg, sum helt hana fyri heimssamfelagnum, og hon verður verandi ein partur av fortíð míni. Røðan var pínlig tá, og hon er pínlig enn, segði Powell í samrøðu við sjónvarpið ABC fyrrakvøldið.

Røðan í ST-trygdarráðnum hevði stóran týdning fyri politikkin hjá George W. Bush, forseta, sum vildi sleppa at leypa á Irak fyri at reka Saddam Hussein, forseta frá. Uppgávan hjá Powell var at sannføra heimssamfelagið um, at Irak hevði vandamikil hópoyðingarváp, og tað gjørdi hann við upplýsingum frá fregnartænastuni CIA. Men upplýsingarnar vístu seg seinni at vera skeivar.

- Onkur í CIA visti, at keldurnar vóru ikki álítandi, men teir søgdu einki, og tað fekk øði í meg, segði Colin Powell við ABC.